betri

**Betri Pensjón P/F**

# Ársfrásøgn 2016

Annual report





# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Bræv frá stjórn | 4 |
| 5 ára yvirlit | 7 |
| Leiðslufrágreiðing | 8 |
| Ársroknskapur | |
| Rakstrarroknskapur | 14 |
| Fíggjarstøða | 15 |
| Eginognsuppgerð | 17 |
| Notur | 18 |
| Leiðsluátekning | 28 |
| Váttanir frá innanhýsis grannskoðara | 29 |
| Váttanir frá óheftum grannskoðara | 30 |
| Partafelagsupplýsingar | 31 |

# Bræv frá stjórn



Mortan Poulsen

Stjóri

Betri Pensjón P/F er eitt lívstrygg-ingar- og pensjónsfelag, ið selir pen-sjónsloysnir til føroyska marknaðin. Felagið fór undir virksemi á sumri í 2007 og hevur nú, knøpp 10 ár seinni, rættiliga fingið fótin fyri seg. Felagið vendir sær bæði til einstak-lingar, virkir og fakfeløg, og hevur góðar og smidligar loysnir til øll.

Betri Pensjón hevur nú ein mark-naðarlut, sum ger felagið til ein veitara á føroyska lívstryggingar- og pensjónsmarknaðinum, sum skal takast í álvara. Ætlanin er at nýta hesa støðu til at fáa enn størri marknaðarlut. Hetta skal gerast við miðvísum átøkum til privatkundar, vinnufyritøkur og fakfeløg.

Samlaða talið av kundum er nú áleið 15.700, harav áleið 12.500 regluliga rinda tryggingargjald. Marknaðarluturin er nú á 20%.

Eftirlønarlógin, sum kom í gildi í 2014, hevði við sær broytingar á føroyska pensjónsmarknaðinum. Lógin ger tað einfaldari hjá veitarum at bjóða seg fram. Nú skal einans sparast upp á eina pensjónskonto í inngjaldingartíðarskeiðinum, og støða skal ikki takast til, hvussu útgjaldið skal skipast, fyrr enn pensjónsaldurin er rokkin. Partur av ráðgevingini er sostatt fluttur frá tíðarskeiðnum, tá pensjónin skuldi gjaldast inn, til tíðarskeiðið, tá útgjaldast skal.

Við eftirlønarlógini kom eisini kravið, at allir føroyingar skulu rinda pensjón. Eftir upprunalógini skuldi rindast 1%, og síðani øktist gjaldið, til tað í 2028 er 15%. Í 2016 varð avgjørt at steðga á við hesi øking. Í 2017 verður aftur farið fram eftir upprunaliga leistinum. Okk-ara fatan er, at tað er umráðandi at skapa tryggar karmar um framtíðar pensjónir, so at tey, ið spara upp til ellisár, vita, hvussu støðan verður. Tey seinastu árini hava í alt ov stóran mun verið framdar broytingar, sum ávirka framtíðar pensjónir. Hetta skapar ótryggleika, og stimbrar ikki hugin hjá føroyingum at spara upp til pensjón.

Úrslitið hjá Betri Pensjón í 2016 er ávirkað av góðum íløguúrsliti, lágum skaðaútreiðslum og hægri avset-ingum í sambandi við longri livitíð hjá føroyingum.

Einki ættarlið í søguni hevur livað so leingi sum hetta. Heldur ikki hevur nakað ættarlið verið eins væl útbúgvið, sum vit, og sum komandi ættarlið verða. Hesi eru øll vaksin upp í nútíðar vælferðar- og brúkarasamfelagi, sum setir høg krøv til tænastu, vørur og til samfelagið annars.
Longda livitíðin hevur við sær øktar útreiðslur til pensjónir. Fyri Betri Pensjón merkir tað, at veitingar nú skulu gjaldast í eitt enn longri tíðar-skeið, enn roknað hevur verið við.

Í roknskapinum fyri 2015 varð mun-andi upphædd sett av í sambandi við, at nýggj forsøgn av livitíðini hjá føroyingum varð kunngjørd. Í 2016 hava myndugleikarnir boðað frá enn ein øking í livitíðini hjá føroyingum,

og hava vit tikið hædd fyri hesi í roknskapinum fyri 2016. Við hesum báðum eyka avsetingum verður mett, at neyðug atlit nú eru tikin hesum viðvíkjandi fyri komandi 5 árini.

Afturat hesum hava vit, sum samfelag, aðrar stórar avbjóðingar. Færri børn verða fødd, og nógvir føroyingar, sum fluttu av landinum í t.d. lestrarørindum, flyta ikki heimaftur. Hetta ger, at tað eru færri og færri, sum bera skulu kostnaðin av vælferð og trivnaði hjá eldra ættarliðinum í Føroyum. Tí mugu vit øll í framtíðini rinda inn til egna pensjón. Somuleiðis mugu væntast fleiri avgjøld og privatar tryggingartænastur, skal tørvurin og krøvini frá komandi ættarliðum av pensjónistum nøktast.

Betri Pensjón hevur síðan byrjan roynt at gjørt tað einfalt og so kostnaðarlítið, sum tilber, at tekna lívstryggingar. Málið er, við gjøgnumskygni og opinleika, at skipa so fyri, at ongin rindar meira til trygging enn neyðugt, og at sum mest verður spart upp til pensjón.

Sum meginregla kann sigast, at ein skal hava 5 - 6 ferðirnar árslønina sparda upp, tá komið verður fram til pensjónsaldur, um man ynskir at varðveita sama livistøðið. Skal hetta mál røkkast, er eisini týðandi, at avkastið er so gott sum til ber. Hjá Betri Pensjón ber til at velja, hvussu váðafúsur ein vil verða, og niðanfyri er víst, hvussu nógv 100 kr eru vaksnar til síðani 2012 alt eftir, um ein hevur valt lánsbrøv ella partabrøv. Flestu kundar hava umleið 1/3 í partabrøvum og hjá einum tílíkum kunda eru 100 kr vaksnar til umleið 139 kr. Tað má metast at vera nøktandi.

**Hvat eru 100 krónur blivnar til?**




Ongin ivi er um, at pensjónsmarknaðurin hevur stórar avbjóðingar fyri framman. Øktar avsetingar og herdar ásetingar koma at seta stór krøv til feløg, ið reka pensjónsvirksemi.

Eginognin hjá Betri Pensjón er 43,9 mió kr., ið er 1,69 ferðir størri enn kravið til solvens. Felagið er eisini partur av Betri samtakinum, og er tí partur av einum fíggjarliga sterkum samtaki.



# 5 ára yvirlit

| Høvuðstøl (kr. 1.000) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 121.008 | 114.493 | 96.765 | 264.313 | 76.963 |
| Tryggingarveitingar | -24.528 | -27.823 | 117 | -37.180 | -8.043 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 48.274 | 35.878 | 39.160 | 30.962 | 20.630 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -12.424 | -14.732 | -12.947 | -11.701 | -18.259 |
| Úrslit av endurtrygging | -651 | -746 | -808 | -562 | -333 |
| Tryggingartekniskt úrslit | 999 | -15.483 | -1.171 | -4.161 | -4.710 |
| Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutr. | 1.350 | 525 | 1.920 | 802 | 0 |
| Ársúrslit | 5.948 | -5.554 | 4.204 | 115 | -2.479 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur í alt | 986.543 | 863.578 | 744.450 | 646.524 | 371.332 |
| Eginogn í alt | 43.864 | 37.916 | 43.469 | 39.266 | 39.151 |
| Ognir í alt | 1.036.852 | 906.687 | 794.983 | 691.342 | 415.644 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váðar** | | | | | |
| Kostnaðir í % av tryggingargjøldum | 10,3% | 12,9% | 13,4% | 4,4% | 23,7% |
| Kostnaðir í % av avsetingum | 1,3% | 1,8% | 1,9% | 2,3% | 5,5% |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 829 kr. | 1.144 kr. | 1.251 kr. | 1.748 kr. | 4.806 kr. |
| Kostnaðarúrslit | -0,5% | -1,0% | -1,0% | -1,5% | -4,6% |
| Váðaúrslit | 1,9% | -0,9% | -1,5% | -1,5% | -2,3% |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | | | | |
| Ognarkapitalstig | 4,4% | 4,4% | 5,8% | 6,1% | 10,5% |
| Yvirfulnaðarstig | 157,6% | 67,1% | 142,8% | 33,4% | 335,0% |
| Solvensdekningur | 162,3% | 135,4% | 153,4% | 140,5% | 149,8% |
| **Lyklatøl fyri renting** | | | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | 17,7% | -16,6% | 12,4% | 0,4% | -8,5% |
| Renting av eginogn eftir skatt | 14,5% | -13,6% | 10,2% | 0,3% | -7,0% |
| Renting av fíggjarognum | 5,0% | 4,3% | 6,5% | 7,2% | 13,2% |

# Leiðslufrágreiðing

## Í stuttum

- Úrslitið farna tíðarskeið avlop á 5,9 mió. kr.
- Úrslitið áðrenn skatt 7,3 mió. kr.
- Solvensdekningur við árslok 162,3 %
- Onki vinnningsbýti verður útlutað
- Úrslitið fyri 2017 áðrenn skatt fer væntandi at verða millum 0 - 4 mió. kr.

Betri Pensjón er eitt lívstryggingar- og pensjónsfelag, ið selir pensjónsloysnir til føroyska marknaðin.

### Árið 2016

Úrslitið eftir skatt hjá Betri Pensjón í 2016 gjørdist eitt avlop á 5,9 mió. kr. samanborið við eitt hall uppá 5,6 mió. kr í 2015. Avlopið stavar frá góðum íløguúrsliti, lægri kostnaði og nakað lægri veitingum enn í 2015.

Úrslitið fyri 2016 verður mett nøktandi.

Samlaðu tryggingargjøldini í 2016, íroknað innskot og pensjón flutt frá øðrum feløgum, vóru 121,7 mió. kr samanborið við 115,2 mió kr. í 2015.

### Íløguvirksemi

Samlaða avkastið frá partabrøvum var gott 10,0% í 2016, meðan lánsbrøvini góvu áleið 2,5% í avkasti.

### Fíggjarstøðan

Fíggjarstøðan hjá Betri Pensjón øktist úr 906,7 mió. kr. í 1.036,9 mió. kr. í 2016. Avsetingarnar fyri Unit Link avtalur øktust úr 849,8 mió. kr. í 976,2 mió. kr. Eginognin var 43,9 mió. kr. við árslok 2016 samanborið við 37,9 mió. kr. í 2015

### Býtið av ársúrslitinum

Nevndin mælir til, at ársúrslitið verður flutt til komandi ár.

### Útlit fyri 2017

Útlitini hjá Betri Pensjón fyri 2017 eru góð. Tað verður støðugt arbeitt við at røkka so nógvum kundum sum tilber. At eftirlønarlógin varð sett í gildi, fer eisini at hava jaliga ávirkan á kundatilgongdina í 2017.

Tað er ilt at meta um gongdina á virðisbrævamarknaðunum, sum í ávísan mun hava ávirkan á úrslitið hjá felagnum.

Samanumtikið væntar felagið vøkstur í tali av kundum og tryggingargjøldum, og roknar við, at avlopið verður millum 0 og 4,0 mió.kr. í 2017.

### Hendingar eftir árslok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni við árslok 2016 til í dag er onki hent, sum hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

### Útveiting

Meginparturin av umsitingarligu uppgávunum eru útveittar við útveitingaravtalum, harav ein týðandi partur er útveittur til systurfelagið Betri Trygging.



## Vitanartilfeingi

Fyri Betri Pensjón er tað av alstórum týdningi, at starvsfólk hava høgt vitanarstøði. Tí setir felagið krav um, at starvsfólk, ið loysa uppgávur fyri felagið, verða tryggjað viðkomandi útbúgving og eftirútbúgving fyri at økja førleikarnar, so felagsins kundum verður veitt hollasta ráðgeving.

## Menning

Betri Pensjón leggur stóran dent á at betra um kappingarføri við øðrvísi tryggingarvørum. Tað verður støðugt arbeitt við menning á økinum.

## Virkisgongdir

Fyri at tryggja, at allir viðkomandi kundaupplýsingar eru til taks og lætt atkomiligar, verður arbeitt miðvíst við at goyma hesar ravtøkniliga (elektroniskt). Arbeitt verður miðvíst við at hava dagførda og nútímans heimasíðu. Heimasíðan skal verða besti miðilin hjá kundanum at koma í samband við felagið. Á heimasíðuni skal kundin finna allar upplýsingar um síni pensjóns- og tryggingarviðurskifti.

## Tøknifrøði

Stórur dentur verður lagdur á rakstrartrygdina í teimum tøkniligu loysnunum, sum valdar verða. Støðugt verður arbeitt við at styrkja um KT-trygdina, sum er grundað á KT-politikk, sum ásetur tey yvirskipaðu trygdarkrøvini.

Menning og rakstur av kjarnuskipanum eru løgd hjá uttanhýsis veitara. Hetta er gjørt fyri at tryggja framhaldandi menning og rakstrartrygd, eisini við atliti til tilfeingið og kostnað.

## Compliance og Ábyrgd

Fyri at tryggja, at allar leiðreglur, politikkir og reglugerðir verða hildnar, er regulætlan (compliance) gjørd. Hon skal tryggja, at greiður leistur er viðvíkjandi endurskoðan og eftirmeting av øllum leiðreglum, politikkum og reglugerðum á hvørjum ári. Stjórnin hevur ábyrgdina av, at reglugerð, leiðreglur og politikkir verða fylgd.

Regulvørðurin (ábyrgdarhavandi av compliance) hevur árliga samrøður við viðkomandi starvsfólk fyri at staðfesta, hvørt leiðreglur og politikkir verða fylgd í verki.

Á hvørjum ári ger nevndin eftirmeting av øllum reglugerðum, leiðreglum og politikkum, og tekur støðu til um dagføringar skulu gerast. Soleiðis verður tryggjað, at allar reglugerðir, leiðreglur og politikkir hjá felagnum støðugt fylgja ásettum lógarkrøvum, og at eftirlit er við, at hesi verða fylgd í verki.

## Stýring av váða

Betri Pensjón metir váða at fevna um øll viðurskifti, ið kunnu hava neiliga ávirkan á møguleikar felagsins at røkka handilsligum málum. Felagið nýtir væl skipaðar mannagongdir til at stýra váðunum. Eisini hevur nevndin ásett umfatandi yvirskipaðar leiðreglur, sum stjórn og leiðsla alsamt halda eyga við, verða hildnar.



## Marknaðarváðar

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| Rentuváði<br><br>Partabrævaváði<br><br>Mótpartsváði<br><br>Gjaldførisváði | Yvirskipaða málið við íløguvirksemi felagsins er at fáa sum mest avkast við einum ásettum váðastøði, sum nevndin setur.<br><br>Miðað verður ímóti at hava eina rímuliga spjaðing av íløgunum. | Nevndin í Betri Pensjón hevur samtykt ein íløgupolitikk, sum ásetir karmarnar fyri íløgur felagsins. Íløgupolitikkurin verður dagførdur eftir tørvi ella í minsta lagi árliga.<br><br>Marknaðarváðin verður avmarkaður við, at felagið grundar sítt virksemi á Unit Link-tryggingar, har kundarnir bera allan íløguváðan.<br><br>Spjaðingarváðin verður avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í íløguprógv við undirliggjandi lánsbrøvum og partabrøvum.<br><br>Gjaldførisváðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í tøkum peningi og í íløguprógvum, sum skrásett eru í keypsskálum.<br><br>Mótpartsváðin verður m.a. avmarkaður við at samstarva við íløguumsitarar, sum hava drúgvar royndir og gott orð á sær.<br><br>Tað verður leypandi gjørd frágreiðing um íløgugongdina hjá felagnum. |

## Tryggingarváðar

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| Livitíð/æviskeið<br><br>Deyðstíttleiki<br><br>Avlamnistíttleika<br><br>Spjaðing | Lønandi virksemi á øllum tryggingarproduktum.<br><br>Váðaspjaðing millum tryggingar- og kundabólkar.<br><br>Avmarkandi úrslitsávirkan frá einstøkum skaðahendingum við endurtrygging. | Felagið brúkar prísásetingaramboð, sum taka hædd fyri váðunum og marknaðarstøðuni.<br><br>Greiðar inntekningarreglur.<br><br>Váðajavning við endurtrygging og við hámørkum fyri ymsum tryggingardekningum.<br><br>Gott dátugrundarlag. |

## Operationellur váði

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| KT-váðar<br><br>Løgfrøðiligir váðar<br><br>Umsitingarligir váðar<br><br>Svik<br><br>Umdømi<br><br>Strategi | Tað verður ásannað og góðtikið, at ikki slepst heilt undan rakstrarligum váðum, men at hetta støðugt skal avmarkast til støðið, sum nevndin góðtekur | Felagið avmarkar operationellan váða við politikkum, leiðreglum, innaneftirliti og funktiónsskilnaði. Hetta verður alsamt endurskoðað og dagført.<br><br>Harumframt fylgir felagið neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingarfør.<br><br>Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við kundan. |

Víst verður eisini til Váðafrágreiðingina hjá móðurfelagnum Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á., sum er at finna á heimasíðuni www.betri.fo.

## Etiskar reglur í sambandi við íløgur

Betri Pensjón setir stór krøv til, hvussu samanspardi peningurin verður umsitin, og hvørji etisk krøv verða sett til íløgurnar. Dagført yvirlit yvir fyritøkur, sum eru fevndar av íløguprógvum felagsins, er til skjals á www.sparinvest.dk og www.sparindex.dk.

## Váðaframtíðarmynd

Váðaviðurskiftini eru myndað í talvuni niðanfyri. Talvan vísir váðaviðurskiftini undir teimum settu fyritreytunum fyri teir týdningarmestu váðafaktorarnar. Teir settu faktorarnir skulu ikki takast sum væntanirnar hjá Betri Pensjón, men skulu einans takast sum dømi.

| **Váðaviðurskifti við ymiskum framtíðarmyndum** - tølini eru eftir skatt | **Váða-mynd** | **Samlað ávirkan á úrslit (t.kr.)** | **Broyting í eginogn felagsins** |
|---|---|---|---|
| **31. desember 2016** | | | |
| **Rentuberandi fíggjarkrøv** | a | 0 | 0,0 % |
| **Rentuberandi fíggjarkrøv** | a | 0 | 0,0 % |
| **Partabrøv** | b | -1.902 | -4,3 % |
| **Fastogn** | c | 0 | 0 |
| **31. desember 2015** | | | |
| **Rentuberandi fíggjarkrøv** | a | -263 | -0,7 % |
| **Rentuberandi fíggjarkrøv** | a | 263 | 0,7 % |
| **Partabrøv** | b | -936 | -2,5 % |
| **Fastogn** | c | 0 | 0 |

**Váðamyndir:**
a) Rentuhækking uppá 0,7 prosent stig
b) Rentulækking uppá 0,7 prosent stig
c) Partabrævalækking á 12 prosent
d) Fall í marknaðarvirðinum á bygningar á 8 prosent

## Kapitalstyrki

Niðanfyri er yvirlit, ið vísur kapitalstyrkina hjá Betri Pensjón í mun til tryggingarskyldurnar:

| (Kr. 1.000) | **2016** | **2015** |
|---|---|---|
| **Eginogn** | 43.864 | 37.916 |
| **Immateriel ogn** | 1.625 | 2.562 |
| **Grundarfæfeingi** | 42.239 | 35.354 |
| **Fæfeingiskrav** | 26.020 | 26.119 |
| **Kapitalstyrki** | 16.219 | 9.235 |

Við árslok 2016 var kapitalstyrkin hjá felagnum 16,2 mió.kr. í mun til 9,2 mió.kr. við árslok 2015. Mett verður, at felagið hevur neyðugu fíggjarligu styrkina við atliti til galdandi lógarkrøv.
Viðmerkjast skal, at fæfeingiskravið er 3,5 mió. evrur (26,0 mió kr.).

## Individuellur solvenstørvur

Føroysku ásetingarnar um individellan solvenstørv eru meinlíkar teimum í Danmark, og eru hesar galdandi inn til nýggja evropeiska Solvens II verður sett í gildi. Individuelli solvenstørvurin ger upp kapitalkravið fyri tryggingarfelagið við støði í váðunum, felagið hevur. Vegleiðingin hjá Tryggingareftirlitinum ásetir ikki nakran serligan hátt til uppgerðina. Felagið skal sjálvt velja uppgerðarháttin og skal taka støðu til allar týðandi váðar.

Sum fastur táttur í váðastýringini, eyðmerkir og nøgdargreinar nevndin minst eina ferð um árið allar týdningarmiklar váðar hjá felagnum. Fyri hvønn váðabólk verður ásett eitt kapitalkrav, sum nýtt verður í sambandi við uppgerð av individuella solvenstørvinum. Váðametingin er í høvuðsheitinum grundað á politikkir, sum hvørt ár verða viðgjørdir og góðkendir av nevndini. Í uppgerðini av individuella solvenstørvinum tekur Betri Pensjón støði í Solvens II royndarútrokningini QIS5 frá EU.

Individuelli solvenstørvurin hjá Betri Pensjón er 19,1 mió.kr. við árslok 2016. Yvirdekningurin í mun til individuella solvenstørvin var 24,8 mió.kr.

## Eigaraviðurskiftir

Betri P/F er móðurfelag hjá Betri Pensjón P/F og eigur allan partapeningin í felagnum.

## Leiðslustørv hjá nevnd og stjórn

Upplýsingar um onnur leiðslustørv hjá nevnd og stjórn sambært § 129a í Kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

**Nevndarformaður:**
**Súni Schwartz Jacobsen**

Forstjóri í Ognarfelag Tryggingartakaranna, Betri P/F , Betri Banka P/F og Betri Trygging P/F.

**Nevndarsessir:**

| | |
|---|---|
| Nevndarformaður: | Betri Heim P/F |
| Næstformaður: | Felagið Føroyskir Peningastovnar |
| Nevndarformaður: | Faroe Insurance Company Guernsey |
| Nevndarformaður: | Arbeiðsgevarafelagið fyri Fíggjarstovnar |
| Nevndarlimur: | SDC A/S |

**Nevndarlimur:**
**Heini Joensen**

**Nevndarsessir:**

| | |
|---|---|
| Nevndarlimur: | H. N. Jacobsen's Bókahandil P/F |

**Nevndarlimur:**
**Herjolvur P. Jakobsen**

**Nevndarsessir:**

| | |
|---|---|
| Nevndarformaður: | Bókamiðsølan P/F |

**Nevndarlimur:**
**Bogi P. Nielsen**

**Nevndarsessir:**

| | |
|---|---|
| Nevndarformaður: | P/F í Ánunum |
| Nevndarlimur: | P/F Bergfrost |
| Nevndarlimur: | P/F Skipafelagið Føroyar (Holdingfelag) |
| Nevndarlimur: | P/F Faroe Ship Føroyar. |

| Nota | DKK 1.000 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | **Rakstrarroknskapur** | | |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning** | | |
| 2 | Tryggingargjøld brutto | 121.660 | 115.238 |
| | Endurtryggingargjøld | -651 | -746 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **121.008** | **114.492** |
| | **Íløguvirksemi** | | |
| 3 | Rentuinntøkur og vinningsbýti | 28.973 | 21.119 |
| 4 | Virðisjavningar | 19.074 | 12.917 |
| | Rentuútreiðslur | -49 | -28 |
| | Fyrisitingarkostnaður í sambandi við íløguvirksemi | 277 | 1.870 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **48.274** | **35.878** |
| | **Tryggingarveitingar** | | |
| 5 | Útgoldnar veitingar | -28.100 | -23.896 |
| 6 | Broyting í avsetingum til endurgjøld | 3.572 | -3.927 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **-24.528** | **-27.823** |
| | **Broyting í avseting til Unit Link sáttmálar** | **-126.427** | **-115.114** |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi** | | |
| 7 | Útveganarkostnaður | -3.697 | -4.534 |
| 7 | Fyristingarkostnaður | -8.727 | -10.197 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt** | **-12.424** | **-14.731** |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | -4.904 | -8.186 |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **999** | **-15.484** |
| 8 | Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi | 1.350 | 525 |
| | Íløguúrslit av eginognini | 4.904 | 8.186 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **7.254** | **-6.773** |
| 9 | Skattur | -1.306 | 1.219 |
| | **Ársúrslit** | **5.948** | **-5.554** |

## Fíggjarstøða

### OGN

| Nota | DKK 1.000 | 2016 | 2015 |
| --- | --- | --- | --- |
| 10 | **Immateriell ogn** | **1.625** | **2.562** |
| | **Materiell ogn** | | |
| | Rakstrargøgn | 435 | 16 |
| 11 | **Materiell ogn í alt** | **435** | **16** |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir** | | |
| | Íløguprógv | 15.850 | 25.051 |
| | Onnur útlán | 6.109 | 7.305 |
| | Innlán í kreditfeløgum | 26.330 | 15.025 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt** | **48.289** | **47.381** |
| 12 | **Íløguogn í alt** | **48.289** | **47.381** |
| 13 | **Íløguogn tengd at Unit-Linked tryggingaravtalum** | **976.249** | **849.822** |
| | **Áogn** | | |
| | Áogn hjá tryggingartakarum | 2.669 | 1.592 |
| | **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur í alt** | **2.669** | **1.592** |
| | Áogn hjá atknyttum virkjum | 122 | 1.078 |
| | Onnur áogn | 3.951 | 3.610 |
| | **Áogn í alt** | **6.742** | **6.280** |
| | **Tíðaravmarkingar** | | |
| | Rentur tilgóðar og innvunnin leiga | 91 | 2 |
| | Aðrar tíðaravmarkingar | 3.422 | 624 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt** | **3.512** | **626** |
| | **Ogn i alt** | **1.036.852** | **906.687** |

| Nota | DKK 1.000 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | **Fíggjarstøða** | | |
| | SKULD | | |
| | **Partapeningur** | 50.000 | 50.000 |
| | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 35.000 | 35.000 |
| | Framflutt úrslit | -41.136 | -47.084 |
| | Vinningsbýti | 0 | 0 |
| 14 | **Eginogn í alt** | 43.864 | 37.916 |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløgusáttmálar** | | |
| | Avsett til endurgjøld | 3.923 | 4.948 |
| | Avsett til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum | 6.371 | 8.809 |
| | Avsett til Unit Link avtalur | 976.249 | 849.822 |
| 15 | **Tryggingartekniskar avsetingar í alt** | 986.543 | 863.578 |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| 9 | Útsettur skattur | 261 | 251 |
| | **Avsetingar í alt** | **261** | **251** |
| | **Skuld** | | |
| | Skuld í samband við beinleiðis trygging | 821 | 563 |
| | Skuld í samband við endurtrygging | 39 | 39 |
| | Skuld til atknýtt virkir | 1.889 | 400 |
| | Onnur skuld | 2.339 | 2.647 |
| | **Skuld í alt** | **5.087** | **3.649** |
| | Tíðaravmarkingar | 1.097 | 1.293 |
| | **Skyldur í alt** | **1.036.852** | **906.687** |

1 Nýttur roknskaparháttur
16 Eventualskyldur og trygdarveitingar
17 Nærstandandi partar
18 Viðkvæmisgreining av fíggjarognum
19 Býti av samlaðum íløguognum á virkisøki og stað

**DKK 1.000**

# Eginognsuppgerð

| | Partapeningur | Yvirkursgrunnur | Flutt úrslit | Eginogn |
|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2015** | **50.000** | **35.000** | **-41.530** | **43.470** |
| Rørslur á eginognini í 2015 | | | | |
| Ársúrslit | | | -5.554 | -5.554 |
| **Eginogn 31. desember 2015** | **50.000** | **35.000** | **-47.084** | **37.916** |
| | | | | |
| **Eginogn 1. januar 2016** | **50.000** | **35.000** | **-47.084** | **37.916** |
| Rørslur á eginognini í 2016 | | | | |
| Ársúrslit | | | 5.948 | 5.948 |
| **Eginogn 31. desember 2016** | **50.000** | **35.000** | **-41.136** | **43.864** |

# Notur

## Alment

Ársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum (hereftir kunngerð nr. 2).

Í samanberingartølunum er gjørd broyting í tíðargreiningum av útreiðslum í sambandi við íløgur. Broytingin merkir, at rakstrarroknskapur felagsins í samanberingartølunum er betraður við á leið 2,9 mió. kr. eftir skatt.

Nýttur roknskaparháttur er óbroyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2015.

**Avrunding av upphæddum**
Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av einstøku tølunum.

**Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini**
Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – herímillum tryggingarveitingar og broyting í avsetingum – sum eru við til at røkka ársins inntøku.

**Konsernviðurskifti og nærstandandi partar**
Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

**Roknskaparligar metingar**
Roknskaparliga virðið á ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum.

Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan
Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Leypandi verða transaktiónir í útlendskum gjaldoyra umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á transaktiónsdegnum.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í útlendskum gjaldoyra verða umroknað til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

**Rakstrarúrslit**
Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri 2016 eftir kontributiónsmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í hesum.

## Rakstrarroknskapurin

**Tryggingargjøld f.e.r.**
Upphæddin fevnir um brutto tryggingarinntøkur javnað fyri latin endurtryggingargjøld.

**Úrslit av íløguvirksemi**
Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. fevnir um ársins rentuinntøku av innlánum, virðisbrøvum og vinningsbýti av partabrøvum. Virðisjavningar fevna um ársins virðisjavning av virðisbrøvum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

**Tryggingarveitingar**
Goldnar veitingar í árinum, umframt broyting í avsetingum til endurgjøld frádrigið endurtryggjarans part,

verða innroknaðar sum tryggingarveitingar. Upphæddin fevnir eisini um afturkeyp av tryggingargjøldum og afturberingar av tryggingargjøldum.

**Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi**
Tann parturin av rakstrarkostnaðinum, ið beinleiðis ella óbeinleiðis kann knýtast at fasthaldan av verandi tryggingum og/ella at nýtekningum, er vístur undir nýtekningarútreiðslum.

Fyrisitingarkostnaður fevnir um útreiðslur, sum eru nýttar í sambandi við umsiting av verandi tryggingum og av tíðargreinaðum útreiðslum, ið viðvíkja roknskaparárinum.

**Flutt úrslit av íløguvirksemi**
Fevnir um tann partin av úrslitinum av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

**Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi**
Vísur tryggingartekniska úrslitið av felagsins sjúkra- og vanlukkutryggingarsáttmálum. Úrslitið er útgreinað í notu við niðanfyristandandi linjum:

• **Tryggingargjøld fyri egna rokning**
Uppkravd tryggingargjøld við frádrátti av møguligum endurtryggingargjaldi.

• **Skaðaendurgjøld**
Fevnir um goldnar veitingar í árinum við frádrátti av møguligum endurgjaldið frá endurtryggjarum og javningar av rørslum í skaðaavsetingum viðvíkjandi sjúkra- og vanlukkutryggingarsáttmálum.

Skaðaendurgjøld fyri egna rokning fevnur soleiðis um kend og væntað skaðendurgjøld í roknskaparárinum og eisini møguligt úrslit av endurgjaldsavsetingum.

Skaðatiltak vivíkjandi sjúkra- og vanlukkutrygging er í fíggjarstøðuni víst í linjuni endurgjaldsavsetingar, ið eisini inniheldur lívstryggingaravsetingar.

**Skattur**
Skattur av ársúrslitinum er roknaður skattur við 18% við støði í úrsliti áðrenn skatt, tillagað fyri ikki skattskyldugar inntøkur og útreiðslur. Útreiðsluførdi skatturin fevnir um aktuellan skatt av skattskylduga ársúrslitinum og javning av útsettum skatti.

Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu frávikunum, sum stava frá, at inntøkur og útreiðslur ikki verða tiknar við í rakstrarroknskapinum og skattskyldugu inntøkuna í sama tíðarskeiði.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum halli, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri.

Felagið er samskattað við móðurfelagið, Betri P/F. Í tann mun skattlig hall verða nýtt av øðrum feløgum í samskattingini, verður skattavirðið av hallinum goldið tí felagnum, sum letur hallið frá sær.

# Fíggjarstøðan

**Immateriell ogn**
Immateriell støðisogn verður upptikin til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.
Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini, tó í mesta lagi í 20 ár.

**Avskrivingartíðarskeið:**

| | |
|---|---|
| Ritbúnað | 5-7 ár |

Immateriell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett, um tørvur er á niðurskriving.

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður innroknað til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.
Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði.

Kostprísur er útveganarprísur, umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

**Avskrivingartíðarskeið:**

| | |
|---|---|
| Innbúgv | 3-7 ár |
| Edv-útgerð | 3-7 ár |

Materiell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett, um tørvur er á niðurskriving.

**Íløguognir**
Virðisbrøv verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning virðissett til dagsvirðið. Handlað virðisbrøv verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum. Dagsvirði á børsskrásettum virðisbrøvum verður gjørt upp við støði í børsskrásetta endakursinum við árslok.

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum.

**Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur**
Avsetingar til Unit Link avtalur fevnir um goldin inngjøld við ískoyti av virðisjavningum og við frádrátti av útgjøldum og fyrisitingarkostnaði.

Avsetingar til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum umfatar skyldur til at veita bonus og avsláttur av inngoldnum tryggingargjøldum v.m.

Avsetingar til endurgjøld fevnir um fráboðaðar, men ikki útgoldnar tryggingarveitingar og eisini um móttikin eingangsinngjøld, ið enn ikki eru deild á Unit Link avtalur. Upphæddin fevnir harumframt um eina meting av tryggingarveitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

**Skuld**
Skuld verður mátað til amortiseraðan kostprís, og hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

**Útsettur skattur**
Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum.

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum. Útsett skattaogn, harundir skattavirðið av framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, ognin kann væntast at kunna realiserast fyri.

**Tíðaravmarkingar**
Fevnir um forútgoldin váðagjøld.

**Aktuellur skattur**
Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

**Lyklatøl**
Hesi eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

| Nota | DKK 1.000 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| 2 | **Bruttotryggingarinntøkur** | | |
| | Leypandi gjøld | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 9.597 | 6.670 |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvsetan | 73.505 | 69.026 |
| | **Leypandi gjøld í alt** | **83.102** | **75.696** |
| | | | |
| | **Eingangsgjøld** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 10.224 | 3.001 |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvsetan | 10.303 | 16.900 |
| | **Eingangsgjøld í alt** | **20.527** | **19.901** |
| | | | |
| | **Inntøkur frá samlagstryggingum** | **18.030** | **19.641** |
| | | | |
| | **Bruttotryggingarinntøkur í alt** | **121.660** | **115.238** |
| | | | |
| | **Herav gjøld** | | |
| | úr Føroyum | 121.660 | 115.238 |
| | | | |
| | Tryggingargjøld frá Unit Link tryggingum | 121.660 | 264.875 |
| | | **121.660** | **264.875** |
| | **Tal av tryggjaðum** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 1.610 | 921 |
| | Tryggingar teknaðar í samband við starvsetan | 12.834 | 12.222 |
| | Samlagstryggingar | 12.719 | 11.246 |
| | | | |
| 3 | **Rentuinntøkur og vinningsbýti** | | |
| | Rentur av virðisbrøvum, innlánum og útlánum | 411 | 11.386 |
| | Vinningsbýti frá kapitalpørtum | 28.561 | 9.733 |
| | **Rentuinntøkur og vinningsbýti í alt** | **28.973** | **21.119** |
| | | | |
| 4 | **Virðisjavningar** | | |
| | Partabrøv | 6.250 | 28.960 |
| | Lánsbrøv | 12.824 | -16.043 |
| | **Virðisjavningar í alt** | **19.074** | **12.917** |
| | | | |
| 5 | **Útgoldnar veitingar** | | |
| | Eftirløn | -2.617 | -1.856 |
| | Eingangsútgjøld við deyða | -5.142 | -6.897 |
| | Eingangsútgjøld við pensionering | -2.698 | -3.189 |
| | Veitingar í sambandi við avlamni og óarbeiðsføri | -7.488 | -6.226 |
| | Samlagstryggingar | -720 | -2.125 |
| | Afturkeyp | -2.892 | -3.602 |
| | Bonus og avsláttur | -6.542 | 0 |
| | **Útgoldnar veitingar í alt** | **-28.100** | **-23.896** |

| Nota | DKK 1.000 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| 6 | **Broyting í endurgjaldsavsetingum** | | |
| | Avsett endurgjøld | 1.134 | -1.262 |
| | Avsett til bonus og avsláttur | 2.438 | -2.665 |
| | **Broyting í endurgjaldsavsetingum í alt** | **3.572** | **-3.927** |
| 7 | **Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaðir innihalda** | | |
| | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Lønir | -1.082 | -1.462 |
| | Eftirlønir | -181 | -245 |
| | Aðrir kostnaðir til almannatrygd | -47 | -56 |
| | Lønarhæddaravgjald | -110 | -154 |
| | Aðrir starvsfólkakostnaðir | -34 | -173 |
| | **Starvsfólkakostnaður í alt** | **-1.455** | **-2.090** |
| | **Løn og samsýning til nevnd og stjórn** | | |
| | Nevndarsamsýning* | -59 | -36 |
| | Stjórn** | -1.226 | -1.210 |
| | **Fulltíðarstørv** | **2** | **2** |

*Av hesum hevur Herjolvur P. Jakobsen fingið samlaðar 36 tkr. og Bogi P. Nielsen 23 tkr.

**Umframt upplýstu tøl, hevur stjórnin eisini frían bil og frítt fjarsamskifti.

| Nota | DKK 1.000 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | **Samsýning til grannskoðarar** | | |
| | **SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f** | | |
| | Grannskoðan | -163 | -156 |
| | Aðrar tænastuveitingar | -33 | 0 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar í alt** | **-195** | **-156** |
| 8 | **Úrslit av sjúkra- og vanlukkutrygging** | | |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning** | | |
| | Tryggingargjøld brutto | 4.910 | 4.455 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **4.910** | **4.455** |
| | **Skaðaendurgjøld** | | |
| | Útgoldnar veitingar | -3.450 | -3.780 |
| | Broyting í avsetingum til endurgjøld | -110 | -150 |
| | **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning í alt** | **-3.560** | **-3.930** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi í alt** | **1.350** | **525** |

| Nota | DKK 1.000 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| 9 | **Skattur** | | |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **7.254** | **-6.773** |
| | **Skattur 18%** | **-1.306** | **1.219** |
| | Skattur í samskatting | 1.489 | 863 |
| | Broyting í útsettum skatti | -183 | 356 |
| | **Skattur sambært ársfrásøgn** | **1.306** | **1.219** |
| | **Avstemmað skattaupphædd** | **1.306** | **1.219** |
| | **Útsettur skattur** | | |
| | Immateriell ogn | -293 | -461 |
| | Rakstrargøgn | 31 | 17 |
| | Framflutt hall | 0 | 193 |
| | **Útsettur skattur í alt** | **-261** | **-251** |
| 10 | **Immateriell ogn** | | |
| | Útveganarvirði 1. januar | 10.990 | 10.990 |
| | Frágongd í árinum | 0 | 0 |
| | Tilgongd í árinum | 0 | 0 |
| | **Útveganarvirði 31. desember** | **10.990** | **10.990** |
| | Avskrivingar 1. januar | -8.428 | -7.488 |
| | Afturførdar avskrivingar | 0 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum | -937 | -941 |
| | Niðurskrivingar í árinum | 0 | 0 |
| | **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-9.365** | **-8.429** |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **1.625** | **2.562** |
| | **Roknskaparligt virði við ársbyrjan** | **2.562** | **3.502** |
| | Verður avskrivað yvir | 5-7 ár | 5-7 ár |
| 11 | **Materiell ogn** | | |
| | Útveganarvirði 1. januar | 1.947 | 1.923 |
| | Frágongd í árinum | -167 | 0 |
| | Tilgongd í árinum | 640 | 24 |
| | **Útveganarvirði 31. desember** | **2.420** | **1.947** |
| | Avskrivingar 1. januar | -1.931 | -1.923 |
| | Avskrivingar uppá seldar ognarlutir | 167 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum | -221 | -8 |
| | **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-1.986** | **-1.931** |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **435** | **16** |
| | **Roknskaparligt virði við ársbyrjan** | **16** | **0** |
| | Verður avskrivað yvir | 3-7 ár | 3-7 ár |

Nota DKK 1.000

12 **Útgreinan av íløguognum**

| | Roknskaparligt virði | |
|---|---|---|
| | **Ársbyrjan** | **Árslok** |
| Íløguprógv í útlendskum partabrøvum | 6.520 | 15.850 |
| **Íløguprógv í øðrum kapitalpørtum í alt** | **6.520** | **15.850** |
| | | |
| Íløguprógv í statslánsbrøvum | 8.348 | 0 |
| Íløguprógv í realkreditlánsbrøvum | 8.221 | 0 |
| Íløguprógv í virkislánsbrøvum | 1.963 | 0 |
| **Íløguprógv í lánsbrøvum í alt** | **18.531** | **0** |

| | **Avkast í % áðrenn skatt** |
|---|---|
| Íløguprógv í útlendskum partabrøvum | 11,0% |
| **Íløguprógv í øðrum kapitalpørtum í alt** | **11,0%** |
| | |
| Íløguprógv í statslánsbrøvum | -0,6% |
| Íløguprógv í stutt og langtíðar realkredit- og statslánsbrøv | 2,2% |
| Íløguprógv í virkislánsbrøvum | 3,9% |
| **Íløguprógv í lánsbrøvum í alt** | **2,5%** |

| | **2016** | **2015** |
|---|---|---|
| 13 **Íløguognir knýttar at Unit Link-avtalum** | | |
| **Býti av íløguognum uttan trygd** | | |
| Partabrøv | 347.491 | 302.137 |
| Lánsbrøv | 628.758 | 547.685 |
| **Íløguognir knýttar at Unit Link sáttmálum í alt** | **976.249** | **849.822** |

| Nota | DKK 1.000 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| 14 | **Eginogn** | | |
| | **Partapeningur** | | |
| | Partapeningur við ársbyrjan | 50.000 | 50.000 |
| | **Partapeningur í alt** | **50.000** | **50.000** |
| | **Yvirkursgrunnur** | | |
| | Yvirkursgrunnur við ársbyrjan | 35.000 | 35.000 |
| | **Yvirkursgrunnur í alt** | **35.000** | **35.000** |
| | **Flutt úrslit** | | |
| | Fluttur úrslit við ársbyrjan | -47.084 | -41.530 |
| | Flutt frá ársúrslitinum | 5.948 | -5.554 |
| | **Flutt úrslit í alt** | **-41.136** | **-47.084** |
| | **Eginogn við árslok** | **43.864** | **37.916** |
| | **Partapeningur** | | |
| | Samlaði partapeningurin hjá felagnum, er eitt partabræv á 50.000 tkr., ið Betri P/F eigur. | | |
| | **Grundarfæfeingið og fæfeingiskrav** | | |
| | Eginpeningur | 43.864 | 37.916 |
| | Immateriell ogn | -1.625 | -3.503 |
| | **Grundarfæfeingið** | **42.239** | **34.413** |
| | **Fæfeingiskrav** | **26.020** | **26.119** |
| 15 | **Tryggingartekniskar avsetingar** | | |
| | Avseting við ársbyrjan | 857.354 | 744.450 |
| | Bruttotryggingarinntøkur | 121.660 | 115.238 |
| | Tryggingarveitingar | -21.808 | -21.286 |
| | Rentur v.m. | 47.048 | 32.441 |
| | Umsitingargjald | -7.112 | -6.054 |
| | Váðaúrslit | -17.647 | -7.436 |
| | Retrospektivar avsetingar við ársenda | 979.496 | 857.354 |
| | Akkumulerað virðisjavnan við ársenda | 7.047 | 6.224 |
| | **Tryggingartekniskar avsetingar við ársenda** | **986.543** | **863.578** |

Í avsetingum til Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum eru 2,2 mió.kr. skylda til atknýtt felag.

| Nota | DKK 1.000 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| 16 | **Eventualskyldur og trygdarveitingar** | | |
| | Sum trygd fyri tryggingartekniskar avsetingar eru skrásettar ognir uppá | 1.020.946 | 882.861 |

Felagið er samskattað við onnur feløg í samtakinum. Samskattaðu feløgini bera tí samábyrgd fyri samlaðu skattaskyldunum.

17 **Nærstandandi partar**

Nevndu feløg hava týðandi ávirkan á Betri Pensjón P/F

| Navn og Heimstaður | Grundarlag fyri ávirkan |
|---|---|
| Ognarfelag Tryggingartakaranna<br>Yviri við Strond 2<br>Postboks 34<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag hjá Betri P/F,<br>ger samtøkuroknskap. |
| Betri P/F<br>Yviri við Strond 2<br>Postboks 34<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag |

**Upplýsingar um nærstandandi partar**
Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á. eigur 100% av partabrøvunum í Betri P/F.

Betri P/F eigur 100% av partabrøvunum í Betri Pensjón P/F og hevur tí avgerandi ávirkan á felagið.

Aðrir nærstandandi partar hjá felagnum eru nevndar- og stjórnarlimir í felagnum og atknýtt feløg, nevndar- og stjórnarlimir í hesum atknýttu feløgunum, umframt nærstandandi persónar hjá áður allýstu persónum.

Í farna ári, fyriuttan vanliga leiðslusamsýning, eru ikki gjørdir aðrir handlar við nevnd, stjórn, leiðarar ellar aðrar nærstandandi partar enn tað, ið nevnt er niðanfyri.

Samsýning til nevnd og stjórn er víst í notu 7.

Felagið keypir tænastur frá móðurfelagnum og systirfeløgum í samtakinum.

Umsitingargjøld til og frá atknýttum feløgum í samtakinum verða avroknað eftir útreiðslunøktandi støði. Húsaleiga hjá atknýttum feløgum verður avroknað eftir marknaðartreytum.

Avtala er gjørd millum feløgini í samtakinum um renting av leypandi millumverandi og er hendan renta ásett eftir marknaðartreytum. Í árinum eru renturnar av leypandi millumrokning við atknýtt feløg samlað -49 tkr. (-28 tkr. í 2015).

Innistandandi hjá systurfeløgum í samtakinum verða rentað eftir vanligum marknaðartreytum. Av samlaðu innlánunum við árslok vóru 10,7 mió.kr. innistandandi hjá atknýttum felag (6,8 mió.kr. í 2015)

| **Týðandi samhandlar við atknýtt feløg** | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Íløgurøkt | 0 | -200 |
| Húsaleiga | 0 | -507 |
| Tænastu og umsitingargjald til atknýtt feløg | -8.971 | -9.188 |
| Afturbering | -1.763 | -2.210 |
| **Týðandi samhandlar við atknýtt feløg í alt** | **-10.735** | **-12.105** |

**Nota** **DKK 1.000**

18 **Viðkvæmisgreining av fíggjarognum**

| **Hending** | **Minsta ávirkan á grundarfæ-feingið í tkr.** |
|---|---|
| Rentuhækking uppá 0,7 prosent stig | 0 |
| Rentulækking uppá 0,7 prosent stig | 0 |
| Partabrævalækking á 12 prosent | 1.902 |
| Ognarprísalækking á 8 prosent | - |
| Valutakursváði (VaR 99,5 prosent) | 458 |
| Tap uppá mótpartar | 2.768 |
| Lækking í deyðatali á 10 prosent | 1.442 |
| Hækking í deyðatali á 10 prosent | -1.652 |
| Hækking í óarbeiðstali á 10 prosent | - |

Felagið hevur ikki gjørt avtalu um nakrar samløgubonusskipanir, og tí hava omanfyri nevndu hendingar onga ávirkan á felagið í mun til bonusmøguleikar.

19 **Býti av samlaðum íløguognum á virkisøki og stað**

| | Føroyar | Evropa annað | Norður Amerika | Japan | Onnur lond | Ei sundur-greinað | **Í alt** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orka | 0,0% | 0,5% | 1,6% | 0,4% | 0,0% | 0,0% | **2,6%** |
| Atfeingi | 0,5% | 3,5% | 2,3% | 0,4% | 0,0% | 0,0% | **6,7%** |
| Ídnaður | 5,7% | 3,7% | 1,7% | 0,9% | 0,6% | 0,0% | **12,6%** |
| Nýstlu- og brúkara-vørur | 2,6% | 4,4% | 12,8% | 2,7% | 0,2% | 0,0% | **22,6%** |
| Heilsu-viðgerð | 1,9% | 2,0% | 6,0% | 1,0% | 0,0% | 0,0% | **11,0%** |
| Fígging | 4,7% | 2,3% | 12,0% | 1,6% | 0,9% | 0,0% | **21,5%** |
| KT | 0,2% | 1,2% | 6,7% | 1,1% | 0,0% | 0,0% | **9,2%** |
| Fjarsam-skifti | 0,4% | 1,4% | 1,6% | 1,3% | 0,4% | 0,0% | **5,1%** |
| Veiting | 0,9% | 0,8% | 2,0% | 0,0% | 0,5% | 0,0% | **4,2%** |
| Ei sundur-greinað | 0,3% | 0,2% | 1,9% | 0,5% | 0,4% | 1,3% | **4,6%** |
| **Í alt** | **17,1%** | **19,9%** | **48,7%** | **10,0%** | **3,0%** | **1,3%** | **100,0%** |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri 2016 hjá Betri Pensjón P/F.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2016, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar 2016 - 31. desember 2016.

Tórshavn, hin 13. mars 2017

**Betri Pensjón P/F**

**Stjórn**

Mortan Poulsen
Stjóri

**Nevnd**

| | |
|---|---|
| Súni Schwartz Jacobsen<br>*Formaður* | Heini Joensen<br>*Næstformaður* |
| Bogi P. Nielsen | Herjolvur P. Jakobsen |

# Váttanir frá innanhýsis grannskoðara

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Betri Pensjón P/F fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2016. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

## Framda grannskoðanin

Grannskoðanin er gjørd við støði í kunngerð frá Tryggingareftirlitinum um fremjan av grannskoðan av tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum og í tráð við altjóða standardum um grannskoðan. Hetta krevur, at grannskoðanin verður løgd til rættis og framd á slíkan hátt so grundað vissa fæst fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin er framd í tráð við tað arbeiðsbýtið, sum er avtalað við uttanhýsis grannskoðanina, og hevur fevnt um meting av skipaðum mannagongdum og innanhýsis eftirlitum, heruppií ta váðastýring, sum leiðslan hevur lagt til rættis, og sum er rættað móti frágreiðingartilgongdum og týðandi handilsligum váðum.

Grundað á týdning og váða hava vit við stakroyndum eftirkannað upphæddir og aðrar upplýsingar í ársroknskapinum. Grannskoðanin hevur eisini framt eina meting av, um tann roknskaparháttur, sum leiðslan hevur valt, er hóskandi, um roknskaparligar metingar hjá leiðsluni eru rímuligar og um hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Vit hava luttikið í grannskoðanini av týðandi og váðakendum økjum, og okkara fatan er, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag fyri okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Okkara fatan er, at skipaðar mannagongdir og innanhýsis eftirlit, íroknað tann váðastýring, sum leiðslan hevur lagt til rættis, ið er rættað móti frágreiðingartilgongdini og týðandi handilsligum váðum, virka á tryggan hátt.

Herumframt er tað okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ogn, skuld, eginogn og fíggjarligu støðu felagsins tann 31. desember 2016 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 2016 í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava, sum ásett í lógini um tryggingarvirksemi, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyristandandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, hin 3. mars 2017

**Petur A. Johannesen**
*grannskoðanarleiðari*

# Váttanir frá óheftum grannskoðara

**Til kapitaleigararnar í Betri Pensjón P/F**

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Betri Pensjón fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2016 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir lógini um tryggingarvirksemi.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lógina um tryggingarvirksemi. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2016 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2016 samsvarandi lógini um tryggingarvirksemi.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava, sum ásett í lógini um tryggingarvirksemi, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyristandandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, hin 3. mars 2017

**SPEKT**
løggildir grannskoðarar Sp/f

**Jóhannes Færø**
*statsaut. revisor*

# Partafelagsupplýsingar

## Felagið

Betri Pensjón P/F
Yviri við Strond 2
Postboks 34
FO 110 Tórshavn
Tel +298 345700
pensjon@betri.fo
www.betri.fo

**Skrás. nr.** **P/F 4627**
**Roknskaparár** **10**

## Stjórn

**Mortan Poulsen**
Stjóri

## Nevnd

**Súni Schwartz Jacobsen**
Nevndarformaður

**Heini Joensen**
Næstformaður

**Bogi Peturson Nielsen**

**Herjolvur P. Jakobsen**

## Innanhýsis grannskoðan

**Petur A. Johannesen**

## Óheftur grannskoðari

**SPEKT** løggildir grannskoðarar Sp/f

**Betri Pensjón P/F**
Yviri við Strond 2
Postsmoga 34
110 Tórshavn

Tel +298 345 700
pensjon@betri.fo
www.betri.fo